Bjørg Brynhildardóttir Egholm
vegna Tjóðveldi

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku o.a. (Sjúkradagpeningalógin)
(Hækkan av hámarki fyri dagpeningaveiting)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku o.a. (Sjúkradagpeningalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 211 frá 15. desember 2025, verður í § 9, stk. 2 “80%” broytt til: “100%”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2027.

Almennar viðmerkingar

Orsakir til uppskotið

Í Føroyum eru í høvuðsheitum tvær skipanir, sum tryggja løntakarum inntøku, tá ið teir gerast óarbeiðsførir vegna sjúku. Summir løntakarar hava sambært starvsmannalógini, sáttmála ella setanaravtalu rætt til løn undir sjúku. Aðrir løntakarar, ha

rundir nógv tímalønt, eru fevndir av sjúkradagpeningaskipanini, um teir annars lúka treytirnar í sjúkradagpeningalógini.

Setanarhátturin er ikki einsamallur avgerandi. Ein tímaløntur kann hava rætt til løn undir sjúku sambært sáttmála ella avtalu, og ein persónur í tíðaravmarkaðum starvi kann vera fevndur av starvsmannalógini. Uppskotið hevur tí týdning fyri teir persónar, sum hava rætt til sjúkradagpening og verða avmarkaðir av hámarkinum í § 9, stk. 2.

Fyri tey, sum hava rætt til fulla løn undir sjúku, hevur sjúka vanliga ikki við sær ein beinleiðis lønarmiss, so leingi rætturin stendur við. Hjá teimum, sum eru fevnd av sjúkradagpeningaskipanini, svarar veitingin sum meginregla til væntaða inntøkumissin, men tó í mesta lagi 80 prosent av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum hjá ófaklærdum.

Hetta kann hava við sær, at tveir løntakarar við somu arbeiðstíð og inntøku verða ymiskt fyri fíggjarliga, tá ið teir gerast sjúkir. Annar kann varðveita fulla løn, meðan hin verður avmarkaður av dagpeningahámarkinum. Tað er sostatt ikki sjúkan ella inntøkumissurin, men rættargrundarlagið undir starvssetanini, sum í hesum føri ger munin.

Ein inntøkulækking í sambandi við sjúku kann raka meint, serliga um húskið hevur lítið fíggjarligt rásarúm. Føstu útreiðslurnar til bústað, mat, hita, flutning og aðrar gerandisútreiðslur minka ikki, hóast inntøkan ger tað. Uppskotið hækkar tó bert veitingina hjá teimum, hvørs væntaði inntøkumissur er hægri enn verandi dagpeningahámark. Persónar, hvørs staðfesti inntøkumissur er lægri enn verandi hámark, fáa sum meginregla longu veiting svarandi til inntøkumissin og fáa tí ikki hægri veiting av uppskotinum.

Fakfeløg hava upplýst fyri uppskotssetaranum, at summir løntakarar lata vera við at sjúkramelda seg ella fara aftur til arbeiðis, áðrenn teir eru nóg væl fyri, tí teir ikki hava ráð til inntøkumissin, sum verandi dagpeningahámark kann hava við sær. Hetta er ikki lýst við hagtølum, og tað ber tí ikki til at staðfesta vavið. Ein fíggjarlig skipan, sum ger tað torført at vera heima undir sjúku, kann tó hava óhepnar avleiðingar fyri tann einstaka, arbeiðsplássið og samfelagið.

Uppskotssetarin heldur ikki, at munurin millum fulla løn undir sjúku og eina veiting, sum er avmarkað til 80 prosent av ásettu sáttmálalønini, er rímiligur. Sjúka rakar uttan mun til setanarhátt, og tørvurin á fíggjarligari trygd er hin sami. Uppskotið javnsetur ikki allar løntakarar til fulnar, men minkar um munin millum tey, sum varðveita fulla løn undir sjúku, og tey, sum verða avmarkað av dagpeningahámarkinum.

Í svari upp á fyrispurning nr. 52-068/2025 eftir § 52 a í tingskipanini varð upplýst, at 601 av 1.406 starvsfólkum í Trivnaðardeplinum og á barnaverndarstovnum vóru tímalønt í 2025. Á eldraøkinum vóru 907 av 1.980 starvsfólkum tímalønt í november 2025. Tølini kunnu ikki leggjast saman ella nýtast sum eitt fullfíggjað yvirlit yvir arbeiðsmarknaðin. Fleiri av teimum tímaløntu kunnu hava annað høvuðsstarv, og tølini vísa heldur ikki, hvussu nógv verða

avmarkað av verandi dagpeningahámarki. Tølini vísa tó, at tímalønt eru ein stórur starvsfólkabólkur á hesum økjum.

Landsstýriskvinnan vísti í sama svari á, at tørvur er á einari nýskipan, sum javnsetur løntakarar á arbeiðsmarknaðinum í sambandi við sjúku. Í samgonguskjalinum frá 2026 stendur somuleiðis, at sjúkradagpeningalógin skal endurskoðast, so umsitingin verður einfaldari og rættvísari.

Uppskotssetarin tekur undir við, at tørvur er á einari breiðari endurskoðan, men tað eigur ikki at forða Løgtinginum í at fremja eina ábót nú.

Lagt verður tí upp til at hækka hámarkið fyri sjúkradagpening úr 80 upp í 100 prosent av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Broytingin merkir ikki, at øll fáa endurgoldið allan sín veruliga inntøkumiss. Fólk, sum vanliga tjena meira enn viðkomandi sáttmálaløn, kunnu framvegis hava ein inntøkumiss undir sjúku. Við uppskotinum verður bygt á verandi skipan, og treytirnar fyri at fáa dagpening og reglurnar um útrokningargrundarlag verða ikki broyttar.

Galdandi lóggáva

Sjúkradagpeningur verður veittur sambært løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku o.a. Endamálið við lógini er at veita fíggjarligan stuðul í sambandi við mista inntøku og/ella sjálvbodna trygging vegna sjúku, skaðatilburð og fráveru áðrenn føðing vegna heilsuvanda fyri móður ella barn. Lógin fevnir eisini um ávísar støður, har persónur má vera um álvarsliga sjúkt barn ella hjúnafelaga, og um barnsins fyrsta og annan sjúkradag.

Dagpeningur verður ikki veittur í tann mun, viðkomandi sambært lóg, trygging ella sáttmála hevur rætt til løn undir sjúku ella aðra veiting, sum endurrindar mistu inntøkuna. Rætturin til dagpening er treytaður av fleiri viðurskiftum, harundir óarbeiðsføri og inntøkumissi, bústaði og fullari skattskyldu í Føroyum og tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Sambært § 7 hevur tann, ið seinastu 13 vikurnar undan sjúkrafráveruni hevur verið í løntum arbeiði í minst 120 tímar tilsamans, rætt til dagpening frá fyrsta fráverudegi. Í serligum førum kann dagpeningur verða veittur, hóast arbeitt er eitt lægri tímatal, um nærri treytir eru loknar.

Dagpeningaveitingin verður vanliga ásett við grundarlagi í miðalinntøkuni seinastu fimm vikurnar undan sjúkrafráveruni. Hjá persónum við skiftandi arbeiðstíðum ella inntøkum kann eitt longri og meira umboðandi tíðarskeið verða nýtt sum útrokningargrundarlag.

Sambært § 9 er dagpeningaveitingin væntaði inntøkumissurin, roknaður eftir § 8. Veitingin kann tó í mesta lagi vera 80 prosent av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum hjá ófaklærdum. Av dagpeningaveitingini verður eisini veitt frítíðarløn, sum fer á frítíðarlønarkontu, og bundna eftirlønargjaldið verður lagt afturat veitingini.

Arbeiðsgevarin afturrindar landskassanum tær útreiðslur, sum standast av, at Almannaverkið rindar dagpening fyri fyrsta til og við fimta fráverudag, tó undantikið í teimum førum, har eingin arbeiðsgevari er. Dagpeningur verður sum meginregla í mesta lagi veittur í 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði. Lógin hevur ávís undantøk, har dagpeningur kann verða veittur longur.

Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at bøta um fíggjarligu trygdina hjá teimum, sum fáa sjúkradagpening og verða avmarkað av verandi hámarki. Skotið verður upp at hækka hámarkið úr 80 upp í 100 prosent av viðkomandi sáttmálaløn. Uppskotið er eitt stig á leiðini móti størri javnstøðu millum løntakarar, sum hava rætt til fulla løn undir sjúku, og løntakarar, sum eru fevndir av sjúkradagpeningaskipanini.

Samandráttur av broytingini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær, at hámarkið fyri dagpening eftir § 9, stk. 2 verður hækkað úr 80 upp í 100 prosent av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum hjá ófaklærdum. Dagpeningaveitingin verður framvegis ásett eftir væntaða inntøkumissinum, og broytingin kemur tí teimum til góðar, sum í dag verða avmarkað av 80-prosenthámarkinum.

Av tí at § 9, stk. 2 er ein felags hámarksregla í sjúkradagpeningalógini, er broytingin ikki avmarkað til tímaløntar løntakarar ella til dagpening vegna egna sjúku. Broytingin kann eisini ávirka dagpening til aðrar persónar, sum eru fevndir av lógini, eitt nú sjálvstøðug vinnurekandi, persónar við sjálvbodnari trygging, útróðrarmenn, sjófólk, persónar í arbeiðsskaðamálum og persónar, sum fáa dagpening í sambandi við sjúkt barn ella álvarsliga sjúkan hjúnafelaga.

Hinar reglurnar um rætt til dagpening, útrokningargrundarlag, læknaváttan, umsóknarfreist, frítíðarløn, eftirløn og veitingartíðarskeið verða ikki broyttar. Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. januar 2027, og at metti árligi meirkostnaðurin verður tikin við í fíggjarlógina fyri 2027.

Avleiðingarnar av uppskotinum

Fíggjarligar avleiðingar

Uppskotið hevur við sær øktar útreiðslur fyri landskassan. Í svari upp á fyrispurning nr. 52-068/2025 eftir § 52 a í tingskipanini metti landsstýriskvinnan leysliga, at tað fer at kosta landskassanum umleið 10 mió. kr. um árið at hækka hægstu dagpeningaveitingina úr 80 upp í 100 prosent av einari arbeiðsmannaløn.

Við støði í hesi meting verður fyribils roknað við einum árligum meirkostnaði fyri landskassan á umleið 10 mió. kr., tá ið broytingin hevur fullan ársvirknað. Nærri útrokningargrundarlag er ikki tøkt hjá uppskotssetaranum.

Endaligi kostnaðurin veldst millum annað um talið á dagpengamóttakarum, inntøkugrundarlagið hjá teimum, longdina á dagpeningatíðarskeiðunum og gongdina í viðkomandi sáttmálaløn. Fakfeløg hava upplýst fyri uppskotssetaranum, at summir løntakarar í dag lata vera við at sjúkramelda seg vegna fíggjarliga missin. Av tí, at hesar upplýsingar ikki eru lýstar við hagtølum, ber ikki til at meta um, hvørt broytingin fer at ávirka talið á umsóknum og harvið endaliga kostnaðin.

Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. januar 2027, soleiðis at meirkostnaðurin kann verða tikin við í fíggjarlógina fyri 2027. Uppskotssetarin mælir til, at neyðuga upphæddin verður sett av til dagpeningaskipanina á fíggjarlógini fyri 2027 og raðfest innan fyri samlaða fíggjarlógarkarmin.

Uppskotið kann eisini hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur og aðrar arbeiðsgevarar. Sambært § 20, stk. 2 í sjúkradagpeningalógini afturrindar arbeiðsgevarin landskassanum dagpeningaútreiðslurnar fyri fyrsta til og við fimta fráverudag. Hækkar dagpeningaveitingin, hækkar afturrindingin eisini í teimum førum, har starvsfólkið verður fevnt av nýggja, hægra hámarkinum.

Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Umsitingarligu avleiðingarnar fyri landið verða mettar at vera avmarkaðar, tí verandi treytir, umsóknarmannagongdir og útrokningarreglur verða varðveittar. Almannaverkið skal tó dagføra hægstu dagpeningaveitingina, útrokningarskipanir og viðkomandi kunningartilfar.

Broytingin víðkar ikki um persónsskaran, sum sambært lógini hevur rætt til dagpening, men tað kann ikki útilokast, at fleiri fara at nýta verandi rætt sín. Mett verður, at broytingin kann røkjast innanfyri núverandi umsitingarhátt.

Reglurnar um skjalprógv og afturrinding hjá kommunalum arbeiðsgevarum verða ikki broyttar. Uppskotið verður tí ikki mett at hava umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið kann hava bæði negativar og positivar fíggjarligar avleiðingar fyri privatar arbeiðsgevarar. Arbeiðsgevarar, sum hava starvsfólk fevnd av sjúkradagpeningaskipanini, kunnu fáa eina hægri afturrinding til landskassan fyri fyrsta til og við fimta fráverudag, um starvsfólkið verður fevnt av nýggja hámarkinum.

Hinvegin kann ein privatur arbeiðsgevari, sum lýkur treytirnar í kapittul 6 a, fáa hægri lønarendurgjald fyri eitt starvsfólk, ið hevur verið óarbeiðsført vegna sjúku longur enn fýra vikur. Hetta kemst av, at endurgjaldið verður gjørt upp eftir reglunum í kapittul 4, har § 9, stk. 2 er staðsett.

Tað hevur ikki borið til at gera eina neyva meting av samlaðu fíggjarligu avleiðingunum fyri vinnuna. Í svarinum upp á fyrispurning nr. 52-068/2025 eftir § 52 a í tingskipanini varð upplýst, at fullfíggjað hagtalsgrundarlag fyri tímalønt og fólk í tíðaravmarkaðum størvum á føroyska arbeiðsmarknaðinum ikki er tøkt.

Uppskotið broytir ikki umsóknarmannagongdir ella skyldur hjá arbeiðsgevarum og verður tí ikki mett at hava umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri dagpengamóttakarar, sum í dag verða avmarkaðir av hámarkinum á 80 prosent av ásettu sáttmálalønini. Millum hesar kunnu vera tímaløntir og aðrir løntakarar, sum ikki hava rætt til fulla løn undir sjúku, og sum arbeiða fulla tíð ella hava eina inntøku oman fyri verandi dagpeningahámark.

Persónar, hvørs væntaði inntøkumissur er lægri enn verandi hámark, fáa ikki hægri veiting av uppskotinum, tí dagpeningaveitingin longu kann svara til allan staðfesta inntøkumissin. Uppskotið tryggjar heldur ikki fulla endurrindan av inntøkumissinum hjá persónum, sum vinna meira enn nýggja hámarkið.

Av tí at broytingin verður gjørd í felags hámarksregluni í § 9, stk. 2, kann hon eisini hava jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri aðrar persónar, sum fáa dagpening eftir lógini og verða avmarkaðir av verandi hámarki. Hetta kann eitt nú fevna um sjálvstøðug vinnurekandi, persónar við sjálvbodnari trygging, útróðrarmenn, sjófólk og persónar, sum fáa dagpening í sambandi við arbeiðsskaða, sjúkt barn ella álvarsliga sjúkan hjúnafelaga.

Tað er ikki tøkt hagtalsgrundarlag, sum vísir, hvussu nógvir persónar í hvørjum bólki fáa hægri veiting av uppskotinum.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Við broytingini hækkar dagpeningaveitingin úr 80% upp í 100% av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum hjá ófaklærdum.

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Á Løgtingi, 22. september 2026

Bjørg Brynhildardóttir Egholm